# Hvussu gita teir, støðan fer at verða

**Hvørja meting hava fjølmiðlafólk, sum arbeiða við ítrótti, av komandi landskappingini í fótbólti**

Tað er trupult at gera sær eina meting av, hvussu landskappingin í fótbólti fer at spæla av. Eingin dystur er spældur enn, og liðini hava fingið misjøvn úrslit í venjingar- og steypadystum.

Men hóast hesar truplu fortreytir – ella kanska júst tí – hava vit aftur í ár biðið umboð fyri fjølmiðlarnar gera eina meting av, hvussu støðan verður í 1. deild hjá monnum, tá ið kappingin er av.

Hetta er vorðið ein afturvendandi táttur í hesum blaði, og fyri einum ári síðani royndu fimm fjølmiðlafólk seg. Tá kláraðu tveir av teimum – Jákup Bogi Joensen á Dimmu og Tórður Mikkelsen í Sjónvarpinum – at gita, hvør fór við gullinum. Teir báðir gittu HB, meðan hinir tríggir gittu B36 og KÍ.

Tað var kanska meira merkisvert, at allir teir fimm gittu rættan niðurflytara. Allir høvdu TB aftast í røðini, og tað vóru eisini tvørámenn, sum noyddust tungu leiðina niður í 2. deild.

Eingin av teimum fimm, sum royndu seg í fjør, kláraði at loysa vónleysu uppgávuna at gita allar plaseringarnar. Men her fáa teir ein møguleika afturat.







| | **Emil L. Jacobsen** *Dimmalætting* | **Finnur Helmsdal** *Oyggjatíðindi* | **Tórður Mikkelsen** *Sjónvarp Føroya* | **Súni Merkistein** *Útvarp Føroya* | **Jákup Mørk** *Sosialurin* |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | B36 | B36 | B36 | B36 |
| 2 | B36 | GÍ | HB | HB | HB |
| 3 | KÍ | HB | KÍ | GÍ | GÍ |
| 4 | GÍ | NSÍ | GÍ | KÍ | VB |
| 5 | NSÍ | KÍ | B68 | NSÍ | KÍ |
| 6 | EB/Streymur | VB | NSÍ | VB | NSÍ |
| 7 | VB | EB/Streymur | EB/Streymur | EB/Streymur | FS Vágar |
| 8 | B68 | FS Vágar | VB | B68 | EB/Streymur |
| 9 | FS Vágar | B68 | FS Vágar | FS Vágar | B68 |
| 10 | Skála | Skála | Skála | Skála | Skála |

# Tvífalt so nógvir sáttmálar

Talið á sáttmálum, sum feløgini sendu til sáttmálanevndina hjá FSF at góðkenna, vaks nógv í 2002, tá ið samanborið verður við 2001.

Í 2001 vórðu 35 sáttmálar góðkendir av FSF, meðan talið vaks til 65 í fjør. Talið á feløgum við góðkendum sáttmálum vaks eisini frá seks til átta.

Týdningurin av góðkendu sáttmálunum hevur einki at gera við samsýningina, sum verða veittar spælarunum. Tær kunnu bæði vera størri og smærri hjá feløgunum, sum hava góðkendar sáttmálar.

At sáttmálin er góðkendur hjá FSF hevur týdning, um spælarin vil sleppa burtur úr avtaluni, ella um felagið vil sleppa av við spælaran. Tá er tað avgerandi, um sáttmálin er góðkendur ella ikki. Hetta kann til dømis hava týdning, tá ið spælari verður seldur av landinum.

Enn er ov tíðliga at siga, hvussu nógvir sáttmálar verða góðkendir av FSF í ár, tí enn eru stundir at gera sáttmálar fyri hetta kappingarárið.

(Kelda: Fótbóltur '02)

# 28 spælarar á landsliðnum

Eitt kappingarár í fótbólti kann vera drúgt, og tað er ymiskt, hvussu spælararnir eru fyri gjøgnum árið. Summir fáa skaðar, áðren leikbann, og onkrir hava minni góð tíðarkeið.

Hetta sæst eisini aftur í hagtølunum fyri spælarar, sum eru við í landsliðshópinum.

Í 2002 vóru 28 spælarar við til teir seks vinar- og EM-dystirnar.

Bara fýra spælarar vóru við í øllum landsdystunum í fjør. Tað vóru Jón Rói Jacobsen, John Petersen, Jákup á Borg og Andrew av Fløtum.

Tríggir av spælarunum, sum vóru inni í landsliðshitanum, spældu ongan dyst í fjør. Teir vóru Meinhardt Joensen, Atli Danielsen og Hans Fróði Hansen.

Fýra spælarar spældu fyri fyrstu ferð á landsliðnum í 2002. Teir vóru Hjalgrím Elttør, Palli Augustinussen, Sjúrður Jacobsen og Klæmint Matras. Av hesum var Hjalgrím tann, sum spældi flestar dystir. Hann var við í fýra dystum. Hinir spældu í einum dysti hvør.

Føroyingar skoraðu sjey mál í teimum seks dystunum. John Petersen gjørdi tvey mál, meðan Rógvi Jacobsen, Julian Johnsson, Fróði Benjaminsen, Christian Høgni Jacobsen og Uni Arge gjørdu hvør sítt mál.

(Kelda: Fótbóltur '02)






Eitt flogfar fer sveimandi uppi yvir okkum. Vit eygleiða tað og droyma okkum út í heim. Tíbetur er stutt millum dreym og veruleika. Kom við.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo